# P/F BAKKAFROST HOLDING

## GLYVRAR

## ÁRS- OG KONSERNROKNSKAPUR

## 2006

(16. ROKNSKAPARÁR)

**AVRIT**

# INNIHALDSYVIRLIT

Síða


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Ársfrágreiðing | 3 - 5 |
| Leiðsluátekning | 6 |
| Grannskoðanarátekning | 7 |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 - 9 |
| Rakstrarroknskapur 2006 | 10 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember 2006 | 11 - 12 |
| Veðsetingar- og eventualskyldur | 13 |
| Notur | 14 - 17 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Bakkafrost Holding |
| Bústaður: | Bakkavegur, 625 Glyvrar |
| Heimstaðarkommuna: | 625 Glyvrar |
| Skattakommuna: | 625 Glyvrar |

**Nevndin**

Líggjas í Bø, formaður, 700 Klaksvík
Símun Hans Jákup Mikkelsen, 100 Tórshavn
Hans Jacobsen, 625 Glyvrar
Martin Ingolf Jacobsen, 100 Tórshavn
Odd Eliasen, 530 Fuglafjørður
Virgar Dahl, 450 Oyri

**Stjórn**

Jóhan Regin Jacobsen, 600 Saltangará

**Grannskoðan**

P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Árs- og konsernroknskapurin 2006 er góðkendur á felagsins ársaðalfundi, hin - 2007.

________________
fundarstjóri

ÁRSFRÁGREIÐING 2006

**Virksemi**
Virksemi felagsins er laksaaling og framleiðsla av laksi. Felagið er virkið í smoltaling, sjógvaling, kryvjing og víðarivirking av laksaúrdráttum.

**Fíggjarliga gongdin**
Ársins úrslit fyri 2006 eftir skatt er kr. 21.551.510. Hetta metir leiðsla felagsins vera nøktandi.

**Íløgur**
Í sambandi við samanlegging av feløgunum P/F Faroe Salmon, P/F Bakkafrost og P/F 21. desember, umframt umskipanir í sambandi við etablering av verandi konsern, verður víst til notu 3, har materiell støðisogn er útgreinað.

**Gransking og nýmenning**
Felagið nýtti í árinum kr. 325.000 til gransking og nýmenning.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum.

**Framtíðarútlit**
Alingin hevur gingið sera væl í árinum. Vøksturin hevur verið góður og fellið sera lágt. Marknaðurin var trupul við ársbyrjan. Stórur eftirspurningur í árinum viðførdi, at laksaprísurin frá januar til juni nærum tvífaldaðist. Við ársenda var prísurin tó aftur komin niður á eina legu umleið 25 kr/kg. Talvan niðanfyri vísir marknaðarprísin hjá FHL fyri feskan kruvdan laks stødd 4-5 FCA Oslo síðani ár 2000. Talvan vísir, at nógv sveiggj hava verið í laksaprísinum seinastu árini, men í høvuðsheitum kann sigast, at prísurin hevur verið góður fyri alaran í 2006. Høgi marknaðarprísurin í 2006 kann tó viðføra, at útboðið veksur, og kann hetta fara at vísa seg seinni í 2007 og 2008.




Price FCA Oslo for fresh whole gutted superior Atlantic salmon, iced, in polyboxes. Gathered by Federation of Norwegian Fishing Industry (FHL) and Norwegian Seafood Association (NSL)From 20 of the largest exporters.

Bakkafrost samtakið leggur størstan dentin á at selja liðugvørurnar sum víðarivirkaðar vørur í longri avtalum. Hetta viðførur vanliga ein javnari sølupris, har sveiggini ikki eru í sama mun sum í feskfiskaprísinum. Í hesum sambandi er felagið farið undir at víðka framleiðsluorkuna av liðugvørum, soleiðis at gjørligt verður at framleiða størri part av egna laksinum til lidnar vørur. Víðkanin verður klár at taka í nýtslu eftir summarsteðgin 2007, og er framleiðsluorkan tá tvífalda.
Leiðsla felagsins metir at felagið við samanleggingini á sumri 2006 stendur munandi sterkari viðvíkjandi kappingarførinum. Høvuðssjónarmiðið í samanleggingini var at skipa eitt samtak, har atlit vóru tikin fyri veterineru-, umhvørvisligu- og fíggjarligu viðurskiftunum.

**Partaeigara- og konsernviðurskifti**
Partapeningurin er kr. 2.991.789. Hesin partaeigari er á yvirlitinum, samb. § 28b í partafelagslógini.

P/F FB Holding
Hans Jacobsen
P/F Havsbrún
J. Regin Jacobsen
P/F Hjallur

**Konsernviðurskifti**
P/F Bakkafrost Holding eigur meirilutan av partapeninginum í hesum feløgum, ið eru við til innaravirðið í konsernroknskapinum, eftir javningar fyri innanhýsis vinning:

| | Ognarpartur | Úrslit 2006 | Eginogn 31.12.2006 |
|---|---|---|---|
| P/F Faroe Smolt | 100% | 13.050.366 | 1.907.714 |
| P/F Faroe Salmon | 100% | 4.262.408 | 27.226.913 |
| P/F Bakkafrost | 100% | 1.853.336 | -276.025 |
| P/F Kassavirkið á Bakka | 100% | 35.246.614 | 3.380.094 |
| P/F Faroe Salmon Processing | 100% | 23.833.751 | 25.197.576 |

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. 21.551.510**, meðan flutt úrslit er uppá kr. 36.809.918, ið nevndin mælir til at flyta til næsta ár.

**Eginpeningurin** verður nú **kr. 171.477.081.**

## LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt árs- og konsernroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2006 hjá P/F Bakkafrost Holding.

Árs- og konsernroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum í galdandi ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýttu roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at árs- og konsernroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðingin og árs- og konsernroknskapurin fyri 2006 verða hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Glyvrar, hin 26. februar 2007

| | | | |
|---|---|---|---|
| Stjórn: | J. Regin Jacobsen | | |
| Nevnd: | Líggjas í Bø<br>formaður | S. Hans J. Mikkelsen | Hans Jacobsen |
| | Martin I. Jacobsen | Odd Eliasen | Virgar Dahl |

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað árs- og konsernroknskapin hjá P/F Bakkafrost Holding fyri 2006 , sum leiðslan hevur sett upp.

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í árs- og konsernroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í árs- og konsernroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at árs- og konsernroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Tórshavn, hin 26. februar 2007

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

| | |
|---|---|
| Jógvan Amonsson<br>statsaut. revisor | Jógvan Joensen<br>cand.merc.aud. |

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Árs- og konsernroknskapurin er uppsettur eftir galdandi ársroknskaparlóg. Roknskapárhátturin er broyttur, í mun til seinasta ár, soleiðis at úrslitið hjá dótturfeløgum, við negativari eginogn, eru tikin við í rakstrinum, og móðurfelagsskyldurnar tiknar við sum avsetingar. Ávirkanin av broytingini er førd yvir eginognina. Samanlíkningartølini eru óbroytt.

Allar inntøkur verða førdar í rakstrarroknskapinum, so hvørt tær verða vunnar. Hetta er eisini galdandi fyri virðisbroytingar á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, sum hoyrir árinum til, verður tikin við í rakstrarroknskapinum, eisini møguligar av- og niðurskrivingar.

## KONSERNROKNSKAPUR

Móður- og konsernroknskapurin er uppsettur eftir innanvirðisháttinum.

Konsernroknskapurin vísir móðurfelagið og dótturfeløgini undir einum. Allir internir handlar og millumverandi, eins og konserninternir kapitalpartar, eru elimineraðir.

Inntøkur og kostnaður frá kapitalpørtum eru upptikin í móðurfelagsroknskapin eftir úrsliti, áðrenn skatt, í dótturfeløgunum. Skattur í móður- og dótturfeløgunum er hereftir kostnaðarførdur í móðurfelagnum.

Úrslitið, áðrenn skatt, vísir hereftir úrslitini, áðrenn skatt, í øllum atknýttu feløgunum.

Kapitalpartar, undir fíggjarligari støðisogn, vísa ognarpartarnar í atknýttum og assosieraðum feløgum til innara virði. Um eginognin er negativ verður niðurskrivað til 0, og upphæddin verður avsett undir skyldum, í tann mun, móðurfelagið heftir fyri skuldini.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Nettosøla**
Nettosølan er øll fakturerað og kontantsølan, har vøran ella tænastan er veitt keyparanum innan árslok. Meirvirðisgjald og veittur avsláttur eru drigin frá.

**Rakstrarkostnaður**
Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

**Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður**
Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður fevna um inntøkur og kostnað, sum ikki hoyra til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni.

**Av- og niðurskrivingar**
Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða nýtslutíð og verða gjørdar við eins stórum árligum parti. Niðurskrivingar eru gjørdar, tá virðini varandi hava eitt lægri virði enn bókførda virðið.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður eru rentuinntøkur og -kostnaður, eins og niðurskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum.

**Óvanligar inntøkur og kostnaður**
Óvanligar inntøkur og kostnaður fevna um upphæddir, ið ikki eru afturvendandi, og sum ikki hava nakað við vanliga rakstur felagsins at gera.

**Skattur**
Skattur verður kostnaðarførdur við tí upphædd, sum viðvíkur ársúrslitinum. Kostnaðarførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar.
Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða nýtslutíð og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Í ávísum føri verður eitt minstavirði (scrapvirði) ásett, sum ikki verður avskrivað niðurum.

Nýtslutíðin er ásett soleiðis:

| | |
|---|---|
| Bygningar | 25 ár |
| Maskinur og tól | 10 ár |
| Bilar | 5 ár |
| Teldur | 3 ár |

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd í útveganarárinum.

Tá materiell støðisogn verður seld, verða vinningur ella hall gjørd upp sum munurin millum søluprís og niðurskrivaða virði á støðisognini, sum verða tikin við í rakstrarroknskapin.

Niðurskrivingar verða gjørdar, tá virðini varandi hava eitt lægri virði enn bókførda virðið.

**Fíggjarlig støðisogn**
Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða tiknir við eftir innanvirðisháttinum. Rakstrarúrslitið hjá atknýttum feløgum verða tikin við í rakstrarroknskapin hjá móðurfelagnum í roknskaparpostinum "Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum", sum eisini verður ført undir eginognina í serstøkum posti nevndur "Tiltakspeningur av nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum".

Onnur virðisbrøv verða tikin við til útveganarvirði.

**Vørugoymslur**
Vørur á goymslu verða virðisásettar til kostvirði eftir FIFO-háttinum.

Livandi fiskur er uppgjørdur til nettorealatiónsvirði.

**Áogn**
Áognin er tikin við til áljóðandi virði. Tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingameting og frádrigin í rakstrinum.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar undir ognini er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi ársroknskapum.

**Avsetingar til útsettan skatt**
Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og kostnaður ikki verða tikin við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuni í sama tíðarskeiði.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til áljóðandi virði við árslok.

**Veðhald- kautión- og eventualskyldur**
Veðhalds- og aðrar skyldur verða upplýstar í ársroknskapinum, tá tær koma fyri.

# RAKSTRARROKNSKAPUR 2006

| | Nota | Móðurfelagið 2006 | Móðurfelagið t.kr. 2005 | Konsernin 2006 | Konsernin t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | | 3.909.600 | 45.671 | 198.540.504 | 64.090 |
| Goymslubroyting | | 0 | -38.743 | 120.194.299 | -35.093 |
| Framleiðslukostnaður | | 0 | -7.980 | -215.332.274 | -17.148 |
| Annar kostnaður | | -576.036 | -2.631 | -27.351.956 | -3.225 |
| **Bruttoúrslit** | | **3.333.564** | **-3.684** | **76.050.573** | **8.625** |
| Aðrar rakstrarinntøkur | | 0 | 939 | 6.136.100 | 939 |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -226.574 | -2.022 | -34.667.446 | -8.735 |
| Avskrivingar | 3 | -775.382 | -3.347 | -13.441.174 | -7.381 |
| **Úrslit, frá primerum rakstri** | | **2.331.608** | **-8.114** | **34.078.053** | **-6.553** |
| Rentuinntøkur o.t. | | 450.412 | 48 | 455.562 | 48 |
| Inntøkur frá kapitalpørtum í atknýttum virkjum | | 21.332.511 | -960 | 0 | 0 |
| Inntøkur frá kapitalpørtum í assosieraðum virkjum | | -59.312 | 0 | -59.312 | 0 |
| Inntøkur frá øðrum kapitalpørtum | | 17.050 | 0 | 17.050 | 0 |
| Rentukostnaður o.t. | | -2.239.959 | -1.690 | -12.496.578 | -5.381 |
| **Úrslit, áðrenn óvanligar postar** | | **21.832.309** | **-10.717** | **21.994.776** | **-11.886** |
| Óvanligur vinningur | | 0 | 0 | 0 | 948 |
| **Úrslit, áðrenn skatt** | | **21.832.309** | **-10.717** | **21.994.776** | **-10.938** |
| Skattur | 2 | -280.800 | -10 | -443.266 | -10 |
| **Úrslit, áðrenn minnilutar** | | **21.551.510** | **-10.726** | **21.551.510** | **-10.947** |
| Minnilutapartar | | 0 | 0 | 0 | 221 |
| **Ársúrslit** | | **21.551.510** | **-10.726** | **21.551.510** | **-10.726** |

INPACT INTERNATIONAL

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2006

| OGN | Nota | Móðurfelagið 2006 | Móðurfelagið t.kr. 2005 | Konsernin 2006 | Konsernin t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Grundøki og bygningar | | 23.478.181 | 1.440 | 90.557.372 | 12.422 |
| Tøkniogn og maskinur | | 0 | 14.730 | 81.239.144 | 37.190 |
| Onnur støðisogn, rakstrartól og innbúgv | | 0 | 686 | 8.504.149 | 975 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 3 | **23.478.181** | **16.856** | **180.300.665** | **50.588** |
| Kapitalpartar í atknýttum feløgum | | 57.139.561 | 322 | 0 | 0 |
| Kapitalpartar í assosieraðum feløgum | | 258.508 | 0 | 258.508 | 0 |
| Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | | 255.378 | 103 | 6.690.968 | 327 |
| **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | 4 | **57.653.447** | **424** | **6.949.476** | **327** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **81.131.628** | **17.280** | **187.250.141** | **50.914** |
| Livandi fiskur | | 0 | 0 | 116.672.455 | 4.100 |
| Lidnar vørur | | 0 | 0 | 3.542.613 | 0 |
| Rávørur og hjálpievni | | 0 | 0 | 2.511.096 | 0 |
| Fóður á goymslu | | 0 | 0 | 1.751.154 | 183 |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **0** | **0** | **124.477.318** | **4.283** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 0 | 0 | 42.053.927 | 0 |
| Áogn, atknýtt virki | | 143.192.201 | 1.139 | 0 | 0 |
| Onnur áogn | | 0 | 61 | 4.789.079 | 220 |
| Tíðargreiningar | | 0 | 17 | 0 | 105 |
| **Áogn tilsamans** | | **143.192.201** | **1.216** | **46.843.006** | **325** |
| Peningur | | 12.485 | 100 | 946.127 | 1.025 |
| **Peningur tilsamans** | | **12.485** | **100** | **946.127** | **1.025** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **143.204.686** | **1.316** | **172.266.452** | **5.633** |
| **OGN TILSAMANS** | | **224.336.314** | **18.597** | **359.516.592** | **56.548** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2006

| | | Móðurfelagið | | Konsernin | |
|---|---|---|---|---|---|
| SKYLDUR | Nota | 2006 | t.kr. 2005 | 2006 | t.kr. 2005 |
| Partapeningur | | 2.991.789 | 1.000 | 2.991.789 | 1.000 |
| Meirvirði av partabrævaútgávu | | 86.676.199 | 19.000 | 86.676.199 | 19.000 |
| Uppskrivingarburturleggingar | | 0 | 0 | 8.591.961 | 0 |
| Tiltakspeningur - innanvirðisgrunnur | | 44.999.175 | 0 | 8.510 | 0 |
| Flutt úrslit | | 36.809.918 | -31.059 | 73.208.622 | -31.059 |
| **Eginpeningur tilsamans** | 6 | **171.477.081** | **-11.059** | **171.477.081** | **-11.059** |
| Minnilutapartar | | 0 | 0 | 0 | -368 |
| Aðrar avsetingar | | 276.025 | 11.061 | 0 | 0 |
| Avsett útsettan skatt | 2 | 2.552.220 | 0 | 9.590.652 | 0 |
| **Avsetingar tilsamans** | | **2.828.245** | **11.061** | **9.590.652** | **0** |
| Veðskuld | 5 | 7.650.250 | 11.854 | 47.741.519 | 39.820 |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **7.650.250** | **11.854** | **47.741.519** | **39.820** |
| Veðskuld | 5 | 9.792.787 | 4.900 | 23.477.224 | 10.504 |
| Rakstrarkredittir | | 12.196.900 | 1.502 | 80.857.310 | 16.384 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 31.989 | 179 | 17.649.686 | 730 |
| Partafelagsskattur | | 0 | 0 | 87.511 | 0 |
| Annar skattur | | 34.460 | 10 | 34.460 | 10 |
| Skuld til atknýtt virki | | 12.297.857 | 0 | 0 | 0 |
| Onnur skuld | | 8.026.745 | 150 | 8.601.150 | 528 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **42.380.738** | **6.741** | **130.707.341** | **28.154** |
| **Skuld tilsamans** | | **50.030.988** | **18.595** | **178.448.860** | **67.975** |
| SKYLDUR TILSAMANS | | 224.336.314 | 18.597 | 359.516.592 | 56.548 |

## VEÐSETINGAR- OG EVENTUALSKYLDUR

Konsernfeløgini borga sum sjálvskuldarar fyri hvørjum øðrum fyri allar skuld til P/F Føroya Banka. Givnir veðrættir í einum felagi, eru sostatt eisini galdandi fyri onnur feløg í samtakinum.

Alifiskur, bæði á smoltstøðum og svimjandi fiskur, er veðsettur. Eisini er allar fastar ognir við tilhoyrandi útbúnaði veðsett. Sama er galdandi fyri aliútbúnaði.

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar eru í høvuðsheitum veðsett.

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| | Móðurfelagið | | Konsernin | |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | | t.kr. |
| | 2006 | 2005 | 2006 | 2005 |
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | | | |
| Lønarkostnaður | 224.468 | 1.885 | 32.578.923 | 8.450 |
| Almenn gjøld, eftirløn og trygging | 2.106 | 137 | 2.088.523 | 285 |
| | **226.574** | **2.022** | **34.667.446** | **8.735** |
| Harav til: | | | | |
| Stjórn | 0 | 917 | 1.666.040 | 917 |
| Nevnd | 224.468 | 167 | 224.468 | 167 |
| Ársverk í roknskaparárinum. | 1 | 7 | 176 | 38 |

| | Móðurfelagið 2006 | Móðurfelagið 2005 | Konsernin 2006 | Konsernin 2005 |
|---|---|---|---|---|
| **Nota 2. Skattur** | | | | |
| Útsettur skattur, primo | 0 | 0 | 5.467.839 | 0 |
| Útsettur skattur, samanlegging | 2.271.420 | 0 | 2.271.420 | 0 |
| Útsettur skattur, ultimo | 2.552.220 | 0 | 9.590.652 | 0 |
| | 280.800 | 0 | 1.851.393 | 0 |
| Skattaogn | 0 | 0 | -1.495.638 | 0 |
| Kapitalvinningsskattur | 0 | 10 | 0 | 10 |
| Roknaður partafelagsskattur | 0 | 0 | 87.511 | 0 |
| | **280.800** | **10** | **443.266** | **10** |

Goldin skattur í árinum er kr. 0.

## Nota 3. Materiell støðisogn, Móðurfelagið

| | Grunddøki og bygningar | Tøkniogn og maskinur | Onnur støðisogn, rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði, primo | 1.800.000 | 20.700.000 | 2.051.644 |
| Tilgongd í sambandi við fusión 01.01.2006 | 21.672.160 | 19.739.491 | 111.340 |
| Flytingar | 1.700.000 | -1.693.780 | -6.220 |
| Tilgongd í árinum | 881.403 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | -1.800.000 | -38.745.711 | -2.156.764 |
| **Keypsvirði, ultimo** | **24.253.563** | **0** | **0** |
| | | | |
| Uppskrivingar, í sambandi við fusión 01.01.2006 | 180.000 | 9.993.000 | |
| Afturførdar uppskrivingar, avhending | -180.000 | -9.993.000 | |
| **Uppskrivingar, ultimo** | 0 | 0 | |
| | | | |
| Avskrivingar, primo | 360.000 | 5.970.000 | 1.365.644 |
| Avskrivingar, frágongd | -360.000 | -5.970.000 | -1.365.644 |
| Avskrivingar í árinum | 775.382 | 0 | 0 |
| **Avskrivingar, ultimo** | **775.382** | **0** | **0** |
| | | | |
| **Bókført virði, ultimo** | **23.478.181** | **0** | **0** |

## Nota 3. Materiell støðisogn, Konsernin

| | Grunddøki og bygningar | Tøkniogn og maskinur | Onnur støðisogn, rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði, primo | 31.048.309 | 75.788.473 | 2.100.133 |
| Tilgongd í sambandi við fusión | 21.672.160 | 19.739.491 | 111.340 |
| Flytingar | 825.364 | -819.144 | -6.220 |
| Tilgongd í árinum | 69.970.482 | 116.741.645 | 12.873.742 |
| Frágongd í árinum | -15.969.575 | -112.424.015 | -5.411.529 |
| **Keypsvirði, ultimo** | **107.546.740** | **99.026.450** | **9.667.466** |
| | | | |
| Tilgongd, samanlegging | 180.000 | 9.993.000 | 0 |
| Tilgongd | 8.927.569 | 827.496 | 541.292 |
| Frágongd | -180.000 | -9.993.000 | 0 |
| **Uppskrivað, ultimo** | **8.927.569** | **827.496** | **541.292** |
| | | | |
| Niðurskrivað, primo | 14.245.502 | 15.515.611 | 3.433 |
| Tilgongd | 2.346.021 | 8.173.334 | 3.433 |
| Frágongd | -16.591.524 | -23.688.945 | -6.866 |
| **Niðurskrivað, ultimo** | **0** | **0** | **0** |
| | | | |
| Avskrivingar, primo | 4.380.346 | 22.794.934 | 1.409.284 |
| Tilgongd | 20.508.700 | 34.181.551 | 2.515.069 |
| Avskrivingar, frágongd | -3.622.034 | -46.288.938 | -3.083.738 |
| Avskrivingar í árinum | 4.649.923 | 7.927.255 | 863.994 |
| **Avskrivingar, ultimo** | **25.916.936** | **18.614.802** | **1.704.609** |
| | | | |
| **Bókført virði, ultimo** | **90.557.372** | **81.239.144** | **8.504.149** |

INPACT INTERNATIONAL

## Nota 4. Fíggjarlig støðisogn

| | Móðurfelagið | | Konsernin | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | t.kr. |
| | Atknýtt | Associeraði | 2006 | 2005 |
| Keypsvirði, primo | 700.000 | 0 | 0 | |
| Tilgongd, samanlegging 01.01.2006 | 22.964.504 | 317.820 | 317.820 | |
| Tilgongd í árinum | 11.677.097 | 0 | 0 | |
| **Keypsvirði, ultimo** | **35.341.602** | **317.820** | **317.820** | |
| Upp-/niðurskirvað, primo | -378.203 | 0 | 0 | |
| Virðisjavningar, samanlegging | 14.481.873 | 0 | 0 | |
| Eginpeningsrørslur, dótturfeløg | 985.392 | 0 | 0 | |
| Innroknaður partur av ársúrsliti | 21.608.536 | -59.312 | -59.312 | |
| Niðurskrivað meirvirði | -14.899.638 | 0 | 0 | |
| **Upp-/niðurskrivað, ultimo** | **21.797.959** | **-59.312** | **-59.312** | |
| **Bókført virði, ultimo** | **57.139.561** | **258.508** | **258.508** | |

| | Onnur virðisbrøv | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði, primo | 102.500 | 326.500 | 500 |
| Tilgongd, samanlegging 01.01.2006 | 135.828 | 135.828 | 25 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 6.267.030 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | -55.440 | -198 |
| **Keypsvirði, ultimo** | **238.328** | **6.673.918** | **327** |
| Upp-/niðurskirvað, primo | 0 | -252.000 | 0 |
| Uppskrivað í árinum | 17.050 | 269.050 | 0 |
| Niðurskrivað í árinum | 0 | 0 | 0 |
| **Upp-/niðurskrivað, ultimo** | **17.050** | **17.050** | **0** |
| **Bókført virði, ultimo** | **255.378** | **6.690.968** | **327** |

| | Móðurfelagið | | Konsernin | |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | | t.kr. |
| | 2006 | 2005 | 2006 | 2005 |
| **Nota 5. Veðskuld** | | | | |
| Fellur, innan 1 ár | 9.792.787 | 4.900 | 23.477.225 | 10.504 |
| Fellur, seinni enn 1 ár | 7.650.250 | 11.854 | 47.741.519 | 39.820 |
| **Veðskuld tilsamans** | **17.443.037** | **16.754** | **71.218.744** | **50.324** |
| Skuldin at gjalda aftaná 5 ár. | 6.442.103 | 0 | 14.586.443 | 6.602 |

| | Móðurfelagið | | Konsernin | |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | | t.kr. |
| | 2006 | 2005 | 2006 | 2005 |
| **Nota 6. Eginpeningur** | | | | |
| Partapeningur | 1.000.000 | 1.000 | 1.000.000 | 1.000 |
| Hækking í sambandi við samanlegging | 1.106.640 | 0 | 1.106.640 | 0 |
| Hækking | 885.149 | 0 | 885.149 | 0 |
| **Partapeningur tilsamans** | **2.991.789** | **1.000** | **2.991.789** | **1.000** |
| Meirvirði av partabrævaútgávu, primo | 19.000.000 | | 19.000.000 | |
| Tilgongd í árinum | 67.676.199 | | 67.676.199 | |
| **Meirvirði av partabrævaútgávu** | **86.676.199** | **19.000** | **86.676.199** | **19.000** |
| Uppskrivingarburturleggingar, primo | 0 | | 0 | |
| Uppskrivingar ísv. samanlegging 01.01.2006 | 10.173.000 | | 10.173.000 | |
| Rørslur | 0 | | 8.591.961 | |
| Afturføring - avhending í árinum | -10.173.000 | | -10.173.000 | |
| **Uppskrivingarburturleggingar ultimo** | **0** | | **8.591.961** | |
| Tilgongd ísv. samanlegging 01.01.2006 | 22.882.326 | | 67.822 | |
| Javningar, dótturfeløg primo | 14.481.872 | | 0 | |
| Eginpeningsrørslur í dótturfeløgum | 985.391 | | 0 | |
| Niðurskrivað meirvirði | -14.899.638 | | 0 | |
| Úrslit 2006 | 21.549.224 | | -59.312 | |
| **Innanvirðisgrunnur ultimo** | **44.999.175** | | **8.510** | |
| **Flutt úrslit** | | | | |
| Salda, primo | -31.059.160 | -9.954 | -31.059.159 | -20.057 |
| Tilgongd samanlegging 01.01.2006 | 44.332.533 | | 44.332.533 | |
| Javning, útsettur skattur 01.01.2006 | 2.300.740 | | 2.300.740 | |
| Aðrar virðisjavningar | 0 | | 14.790.168 | |
| Rætting til minnilutar, primo | 0 | | 0 | -276 |
| Afturførd móðurfelagsskylda | 11.060.519 | | 11.060.519 | |
| Flutt frá uppskrivingarburturleggingum | 10.173.000 | | 10.173.000 | |
| Broyting í roknskaparhátti | 0 | -10.379 | 0 | |
| Flutt til innanvirðisgrunn | -21.549.224 | 0 | 59.312 | 0 |
| Ársúrslit 2006 | 21.551.510 | -10.726 | 21.551.510 | -10.726 |
| **Flutt úrslit tilsamans** | **36.809.918** | **-31.059** | **73.208.621** | **-31.059** |
| **Eginpeningur tilsamans** | **171.477.081** | **-11.059** | **171.477.081** | **-11.059** |

Partabrøvini hava øll eins rættindi.